# H71

faldari 1

FTZ KAPPINGIN

## H71 - TEAM KLAKSVÍK

Sunnukvøldið 11. oktober kl. 20.00

Hoyvíkshøllin



SUÐUROYAR SPARIKASSI
J&K
BØNUS
P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03
polytan
Advokatfelagið Yviri við Strond 4
Auto Service
INNI

AnniJanni

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



> **» *...tí skuggar og skýmd er í dølum og sloknað í summarsølum, komin er heystsins hin dapra stund***

**SO ER SKJØTIL AFTUR SETTUR Á EITT LEIKÁR Í FØROYSKA HONDBÓLTSHEIMINUM, OG SUM ALTÍÐ BRYNJA FELØGINI SEG TIL AT STRÍÐAST Í HONDBOLTSVÍGGI Í HALLUNUM KRING LANDIÐ. FJØLLINI ERU GINGIN, SKURÐURIN TIKIN OG KJØTIÐ FINGIÐ TIL HØLDAR, SO EINKI SKAL DARVA OG TAKA HUGSAVNANINA FRÁ TÍ NÓGV TÝDNINGARMIKLARA HONDBOLTSSPÆLINUM, SUM VIÐ TÍÐINI HEVUR FINGIÐ SLÍKAR FASTATØKUR Á FÓLKI Í HOYVÍK, AT AT KALLA EINKI VERÐUR PRIORITERAÐ HÆGRI ENN ELLA JAVNT VIÐ HONDBÓLTIN.**

Alt annað verður lagað eftir hesum bóltspæli: nær onnur tiltøk skulu skipast í bygdini, so ikki verður komið í trol; nær børnini skulu koma heim í frítíð úr útlondum, so tey kunnu síggja dystir beinleiðis (og ikki bert umvegis facbook-dagføringar í hondboltskjak) og nær nærum alt annað skal vera livað ella virka í bygdini.

Meginskaldið Janus Djurhuus yrkir um heystið í gitnari yrking: „*...tí skuggar og skýmd er í dølum og sloknað í summarsølum, komin er heystsins hin dapra stund*"; men hoyvíkingar kunnu sanniliga ikki kalla heystið fyri dapra stund. Tað er júst tá, at alt í bygdini sprettir og blómar. Hondbólturin, ið hevur ligið í dvala summarið yvir, vaknar og fer undir virki sítt, stuðlafelagið fer undir kaffistovuvirksemi sítt í Hoyvíkshøllini og øll stuðulstiltøkini hjá felagnum verða skipaði og framd hesa ásins tíð.

H71 er, eins og undandfarin ár, við góðum treysti farið undir arbeiði sítt fyri kappingarárið 2015/16, og hóast summarstøðgurin ikki hevur verið langur í ár (Partilleár), so skulu allir liðir og limir í felagnum líka smyrjast, áðrenn maskinaríið koyrir nøktandi aftur. Sum skilst skuldi stýr verið á flestu leysu endum í ungdómsarbeiðinum, og venja øll lið hugagóð undir kønum leiðslum.

Manslið okkara hevur ikki haft nakran støðg í ár, og hevur bert sett venjingaferðina upp nú fram til kappingarbyrjan. Hópurin tykist at vera í góðum formi. Vit hava mist tríggjar lyklaleikarar frá í fjør, nevniliga Hall, Rúna og Boga, og sjálvsagt verður saknur í teimum. Í teirra stað hava vit fingið tvíhenta danska leikaran Peter Krog, Jónas er við aftur og Jóhann Hofgaard hevur valt at vera í Føroyum hetta leikárið, so hann er eisini við og styrkir um hópin.

Aftur í ár stýra Petur og Halgir venjingini við kønari hond, og skuldi hetta alt ligið í tryggari legu. Lars er givin sum røkil hjá liðnum, og í hansara stað er settur hin altíð til dystin fúsi Petur Siversen, ið ikki stendur aftanfyri Lars sum tænandi ond fyri venjarar og leikarar.

*framhald á síðu 13*



2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

**AVATARA**
Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

Prísir úr
158,-
fyri m²

30 ára
garanti

NÓGV YMISK
& SERA VØKUR
MYNSTUR



- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

Nordiksolo 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.



Vitja www.banknordik.fo/solo
og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

SENDISTOVAN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða
Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo
Flügger



LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka
Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár

REYNI SERVICE
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo



Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo




WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo
og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

## ÁTAKSTILBOÐ:
## LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR



### NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE
### EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN

VOLVO

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, høgligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

**ÚR 390.000 KR**

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

WENZEL

NORÐOYA SPARIKASSI

# Orkulán 2,5%

## - Bústaðarlán við lágari rentu

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

*framhald av síðu 4*

Nú hesin fyrsti faldari kemur út, hava vit longu leikt tríggjar dystir í FTZ-kappingini, og væl hevur hilnast. Ja, satt at siga kundi ikki gingið betur. Vit hava við 6 stigum fingið fulla úrtøku, og við einum positivum málmuni á 19 mál fyri hesar tríggjar dystir hevur eingin ivi verið um sigurin í nøkrum av dystunum.

Fyrst møttu vit Neistanum í Hoyvík og vunnu sannførandi 27-16. Síðani kom StÍF til Hoyvíkar og vunnu vit har 25-22 eftir at hava haft nakað av trupulleikum fram móti dystarenda, har vit lorkaðu eina 23-19 føring burtur til 23-22, áðrenn vit fingu støðuna aftur undir kontroll og vunnu 25-22. Síðani hava vit leikt toppdyst í Vestmanna ímóti VÍF og vunnu har 30-25 eftir hálvleiksstøðuna 15-15. Samanumtikið ein flúgvandi byrjan.

Til hetta er at siga, at hópurin hjá fremsta liði er sera væl fyri kropsliga, og byrjar nú av álvara at síggjast, at allur hópurin í fleiri ár so hugagóður og miðvíst hevur vant kropsliga venjing afturat teknisku venjingini. Haldi, at sigast kann, at vit kropsliga hava verið væl betur fyri enn øll hini liðini vit higartil hava møtt í ár, og er hetta avgjørt fortreytin fyri góðu byrjanina hjá okkum.

Síggi nú, at atfinningarsami bloggarin hjá Neistanum, Vagnur Michelsen, turrisliga viðmerkir til sigur okkara í Vestmanna, at avgerandi verður, hvør hevur bestu útlendingarnar á liðnum. Nú er sjálvandi trupult hjá Vagnuri ígjøgnum dómaraseðilin at síggja, at leikarar okkara (eisini teir føroysku, sum hóast alt eru 14/16 av øllum hópinum) eru væl fyri kropsliga. Men eitt er vist, og tað er, at fremsta lið hjá H71 hevur nú, í hvussu so er, í 6 fylgjandi ár skipað vant kropsliga venjing, og er einki at ivast í, at har liggur stórur partur av styrkini hjá H71.

At so einstakir útlendingar eru við á liðnum fyri at styrkja um og menna hópin, tað skaðar sjálvsagt ikki. Og tað skal als ikki verða dult fyri, at vit hava verið sera hepnir við ískoyti frá umheiminum seinastu árini. Fyrst fingu vit í fjør Mark, og er hann góður stuðul, ikki bert á vøllinum sum leikari og sum innpískari fyri hinar leikararnar, men eisini sosialt í felagnum og sum venjari hjá liðum í ungdómsdeildini.

Afturat honum hava vit so í ár fingið Peter Krog, ið einki stendur aftanfyri Mark, hvørki á ella uttanfyri vøllin. Sjálvsagt fegnast vit um hetta og vóna, at slíkt kann bera H71 longur fram á leið. Soleiðis at styrkja seg við útlendingum hevur ongantíð verið mett sum neiligt fyri føroyskan hondbólt, heldur tvørturímóti. Meiri neiligt er, tá feløg liggja og dirgja eftir lokalu føroysku leikarunum í hinum føroysku feløgunum. Tað mennir ikki og sáar bert ilt blóð.

Næsti dystur hjá fremsta liði okkara er ímóti Team Klaksvík við Bogdan á odda. Hjá teimum hevur ikki hilnast væl higartil í kappingini, og hava teir tapt allar sínar dystir. Tað er tó einki at taka seg aftur í, at Team Klaksvík mangan hevur givið okkum ein skarpan gang, og ivaleyst verður sama til dystin nú sunnudagin.


**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

**ÚTGEVARI**
H71

# PARTILLE – Á TRIÐJA SINNI




**SPENT BØRN, BORDOUXLITTIR H71-JAKKAR, BROSANDI FORELDUR, SÓL, LISEBERG, KVEIKTIR VENJARAR OG HONDBÓLTUR. SOLEIÐIS UPPLIVDI EG TAÐ AT FARA TIL PARTILLE Í SUMMAR. HUGSI AT MYNDIRNAR HER EISINI TALA FYRI SEG.**

Men hví valdu vit í H71 at leggja leiðina til Svøríkis á triðja sinni? Well, áhugin tóktist stórur. Leikarar spurdu javnan: Nær fara vit aftur til Partille? Og eingin ivi er um, at hetta gevur leikarunum nakrar øðrvísi og mennandi upplivingar. Tað er ivaleyst eisini spæligleðina enn størri. At øll familjan ella partur av familjuni hjá leikarum eisini javnan eru við á ferðini, gevur ferðini eitt eyka pístr. Í summar vóru vit um 350 hoyvíkingar í ferðalagnum. Motivatiónin hjá leikarum verður varðveitt í enn størri mun tykist greitt – leikararnir ganga høgt upp í summarvenjingina, hóast kapping-arárið í Føroyum er at enda komið. Gularótin er Partille.

Sum nevnt var hetta triðja ferð okkara í Partille. Leikararnir hava búð á trimum ymiskum skúlum. Eisini hava nógvir venjarar og liðleið-arar búð har – umframt nøkur foreldur.

Ynskið hevur verið, at vit í størri mun høvdu nakrar samansjóandi løtur á ferðini – øll børn og vaksin. Tá leikararnir spæla nógv ymisk støð umframt at seinastu dystirnir verða spældir, tá dagurin er farin at halla, hevur verið trupult at savna øll í senn. Tí eggjaðu vit í ár fólki til at verða verandi til sunnudag. Tískil bar til at gera eina hugnliga góðveðursgrilløtu í skúlagarðinum á hesum sinni. Hetta hepnaðist so avbera væl.

Partilleferðin kostar, og tí hava vit roynt at kýta okkum, so at ferðin hjá leikarunum ikki verður ov kostnaðarmikil. Við Partillebólkinum á odda – tað eru foreldur sum hava samkipað alskyns uppgávur og tiltøk at savna penng til ferðina – hava allir árgangir skipað fyri til-tøkum, sum tilsamans hava givið eitt munagott ískoyti til ferðina.

Hondbóltsúrslitini í Partille vóru enn betri í ár enn undanfarin ár. Tað eydnaðist fleiri lið-um at spæla seg í A-bólkin, og fleiri lið komu langt í kappingini. Og mín sann vunnu okkara knáu D11 gull. So spennandi at síggja teir og so herligt at, at kalla alt ferðalagið var møtt upp til bæði semifinalu og finalu teirra at heppa. Tillukku enn einaferð dreingir. *(Í hesum faldaranum er eisini nakað um vitjan teirra hjá sjálvum borgarstjóranum, sum bjóðaði teimum til ein fagnaðardøgurða í móttøkuhúsinum)*

**Takk fyri eina wella viku í Gøteborg við H-sjytti-en, sum tey siga í Partille.**













# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN



TRÓNDUR ARGE

**Aldur:**
20 ár.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Allastaðni uttan í málinum.

**Hvør FTZ-leikari heldur tú er løgnastur?**
Djóni Vest Højgaard.

**Dovnastur?**
John Andor íHorni Sivertsen og Jónas Gunnarsson Djurhuus.

**Størsta „drama queen"-in?**
Peter Krogh

**Hevur flottastu reyv?**
Tað man standa ímillum Sigmundur Dahl og Pætur Thomsen.

**Brúkar longst tíð frammanfyri speglinum?**
Ári Dam.

**Hvat er tín størsta/besta hondbóltsupliving?**
At vinna IHF-Trophy við U21 landsliðinum.

**Hvørjar sangir syngur tu undir brusuni?**
Johnny Cash ella Elvis presly.

**Nær fekst tú tín fyrsta muss?**
Tað man verða nøkur ár síðan.

**Vaskar tú tíni egnu venjingarlæðir?**
Nei, tað ger mamma.

**Hvønn persón samanberur tú teg onkuntíð við – í allari hemmiligheit?**
Tað man verða Niels Viggo ella Hans Kára Hansen.

**Skoraði tú fleiri mál í tínum seinasta dystið, enn tú hevur skorað damur í tínum lívið?**
Man tað verða?

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
Eg havi ikki ein gongd telefon, so hettar dugi eg ikki at svara uppá.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
Tað man verða tann góði stemningurin rundan um felagið.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltsøgu at fortelja?**
Eg havi spælt míni yngri ár við brillum, og tá bleiv eg onkuntíð so argur, at eg fór úr brillinum. Hettar gjørdi, at eg sá dupult, og tá var tað onkuntíð so trupult at skilja ímillum bóltarnar, at eg fekk bóltin í høvdið. Tað helt eg vera sera flóvisligt fyrr.

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!





**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Rokskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo





polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 33405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

**Føroyaprent**

Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo




# RÁKIÐ



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

*Alt til* ***HITA***
***SANITET &***
***VENTILATIÓN***

**Maria Poulsen & Co**

**Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000**

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik



# RØSKU H71-DREINGIR SUM VUNNU GULLIÐ Í PARTILLE!

*Talan, sum Bergtóra Høgnadóttir, nevndarlimur helt fyri dreingjunum, tá teir vóru og vitjaðu Heðin Mortensen, borgarstjóra.*

**Í KVØLD FAGNA VIT TYKKUM, TÍ AT VIT ERU SO SERSTAKLIGA ERRIN AV TYKKUM. IKKI BARA VIT Í H71 OG VIT Í HOYVÍK – NEI, ØLL KOMMUNAN ER ERRIN, SO ERRIN AT SJÁLVT BORGARSTJÓRIN HEVUR BJÓÐAÐ OKKUM TIL DØGURÐA. TAÐ ER KUL. OG EG HAVI ONGANTÍÐ ROYNT HETTA ÁÐUR, SJÁLVT UM EG NÚ ERI 44 ÁR – TIT ERU 11 ÁR OG ERU LONGU BODNIR TIL DØGURÐA HJÁ BORGARSTJÓRANUM.**

Anna og eg umboða í kvøld nevndina í H71, og vit báðar vóru við í Partille, Gøteborg, tá tit vunnu. Tá vit fóru úr Føroyum, væntaðu vit, at nøkur lið hjá H71 – ella Hsjyttien, sum tey siga í Partille – fóru at spæla seg í Abólkin, og at nøkur fóru at standa seg heilt væl. Vit droymdu um tað besta … men kundu ikki vita, hvussu leikur fór at enda. Vit sóu tykkum stríðast, strevast og kempa í hita og brennandi sól. Spenningurin var ØÐILIGUR. SO knáir vóru tit! Vit sóu tykkum tá tit dystaðust, vunnu, fingu steypið og høvdu merkið við tykkum til steypa- og medaljuhandanina. Ein stór og rørandi løta. Tað er hugaligt at hava slíkar evnaríkar og djarvar leikarar sum tykkum í H71. Hvør veit – kanska ein komandi Jóhan á Plógv er tykkara millum. Tað er slettis íkki óhugsandi.

Ein sangur sigur, at gleðin verður tvífaldað, tá man er saman … og júst tað er nakað av tí besta við hondbóltinum: at vinna saman, venja saman, stríðast saman. Eingin kann vinna ein slíkan dyst einsamallur – minnist altíð til tað – tit eru eitt lið. Og tit góvu allir tykkara stóra íkast.

Tá man dugir so væl sum tit, so fylgir ábyrgd eisini við. Onnur børn fara at hugsa: eg vil gjarna blíva líka góður sum hasin! Tí er umráðandi eisini at vera góður við yngri leikarar, læra teir og vera tolin, so teir finna somu spæligleði.

Venjararnir eiga eisini sín part av gullmedaljuni. Vit eru ómetaliga takksom og glað fyri tykkara íkast: Djóni, Pætur, Karl Odmar, Eyðun og Marc. Vit eru rík at eiga slíkar evnaríkar og eldhugaðar venjarar í H71.

Góði Heðin Mortensen, góði borgarstjóri – vit í H71, takka tær hjartaliga, at tú hevur hug at fagna hesum evnaríku H71-dreingjum … Ikki minst, nú tú raðfestir hesa løtu mitt í valstríðnum … hóast eingin atkvøða er at koma eftir hjá hesum 11-ára gomlu … Satt at siga, ein fyrimyndarlig raðfesting. Takk fyri tað!

Í Hoyvik er gott, og tað er fantastiskt hjá okkum at uppliva tann savningardepilin sum børn, ung og foreldur uppliva at Hoyvíkshøll er – ikki minst, nú tú – Heðin Mortensen – eisini hevur sett gongd á at gera enn ein part av Hoyvíkshøll lidnan.

**Lat okkum rópa vit rópa trífalda hurrá fyri Gulldreingjunum hjá H71, venjarunum og borgarstjóranum.**

# EIN HEILSAN FRÁ **BRANDI HALGIRSSON** OG **HØRÐUR TRYGVASON** ÚR FLENSBURG





### AKADEMI

Vit búgva í einum akademii, sum stóð liðugt bygt tann 1. januar 2015, so her er alt nýtt og nossligt.

Til samans eru vit 21 dreingir, ið búgva her á akademinum. Vit eru býttir upp í 11 íbúðir. Í íbúðunum eru 2 kømur, ein lítil køkur og eitt vesi, sum tveir dreingir deilast um.

Akadamiið hevur tríggjar hæddir. Ovast eru gestakømur, í miðhæddini sova vit allir dreingirnir, sum búgva her, og niðast er køkur, vaskirúm og ein lítil bólthøll.

Køkurin í niðastu hædd er ein felagskøkur, har vit, allir dreingirnir, eta. Køkurin verður fyltur upp við mati uml. 3 til 4 ferðir um vikuna.

Vit standa sjálvir fyri øllum máltíðunum, morgunmati, døgurða og náttura.

Í byrjanini var tann dagligi maturin ikki serliga kreativur hjá okkum báðum. Vit máttu líka venja okkum við, at nátturin ikki stóð klárur á borðinum, tá vit komu heim frá venjing, sum hann plagdi heima í Føroyum. So dagliga máltíðin bjóðaði uppá havragrýn til morgunmat, breyð til døgurða og aftur breyð til náttura. Og so hendinga ferð gjørdu vit okkum skrúvur og kjøtsós. Men tað gongur rætta vegin við matgerðini nú ;).

Hvørja viku eru tað fýra dreingir, ið skulu vaska alt akademiið. Tveir vaska øll gólvini, og hinir báðir hava ábyrgdina av, at køkurin er reinur og nossligur.

### VENJING

Vit byrjaðu árið við at fara á eina venjingarlegu til Norra, fyri at styrkja um samanhaldið á liðnum. Hetta var fyrstu ferð vit hittu meginpartin av dreingjunum á liði okkara. Vit vóru í Norra í 5 dagar, og luttóku í einari kapping. Hetta var ein kapping, ið fleiri av teimum norsku liðunum luttóku í.

Túrurin var sera góður, tí samanhaldið á liðnum bleiv avbera gott og ikki minst, tí vit vunnu kappingina ;).

Tá vit komu heim aftur, fóru vit í gongd við at fyrireika okkum til tað langa kappingarárið, ið byrjaði 5. september, og endar fyrst í mai mánað. Vit vandu 3 ferðir um dagin tann fyrsta mánaðin. Hetta var sera hart og krevjandi, men menti okkum nógv sum lið.

Nú venja vit 1 til 2 ferðir um dagin. Venjingarnar eru sera góðar. Tær minna eitt sindur um venjingarnar heima, men støðið og tempoið er nógv hægri, enn vit eru vanir við heima í Føroyum.

### HVAT KREVST FYRI AT KOMA TIL EITT SLÍKT STAÐ

Tað sum krevst fyri at koma á eitt slíkt lið er, at tú venur hart sjálvandi, etur rætt, ert deciplinerað/ur og sum tað mest týdningarmikla, at tú hevur tað stuttligt við tí tú gert, og møtur glað/ur upp til hvørja venjing.

Og so er tað eisini sera týdningarmikið, at tú trýrt uppá teg sjálvan, tí sjálvt um vit koma úr einum sera lítlum landi, so ber tað væl til at koma langt innan ítrottin. Eitt gott dømi um hetta er Jóhan á Plógv Hansen, ið hevur fingið debut á tí danska a-landsliðnum, hetta er ein øgilig motivatión fyri okkum báðar.







Báðir hava vit somu mál um at koma langt innan hondbóltin, og vónandi at gerast professionellir hondbóltspælarir. Vit arbeiða sera hart hvønn dag fyri at náa hesum máli, men njóta eisini hvønn tann einasta dag, og eru sera takksamir fyri, at vit hava fingið hendan møguleikan.

### HÚSARHALD

Fólkini, ið arbeiða her á akademinum, sum eisini eru okkara venjarar, leggja sera stóran dent á, at vit gera okkara skúlating, og at vit halda kømur okkara rein. Einaferð um vikuna skulu vit vaska okkara kømur, og so koma teir, sum arbeiða her, og hyggja um kømrini síggja nøktandi út. Hetta ganga teir sera høgt uppí.

Skúli og húsarhald kemur altíð fram um venjing, so um tú ikki hevur vaskað títt kamar, so sleppur tú ikki at venja.

Hetta kann vera eitt sindur strævi og krevjandi viðhvørt, men hetta lærir okkum eisini nógv, sum t.d. hvussu tú vaskar eitt vesi o.s.fr.

### KONTAKTA AKADEMIIÐ

Vit báðir komu í samband við akademiið gjøgnum Mark Marcher. Hann kendi ein mann, Micheal Døring, sum arbeiddi saman við Mark í Viborg Håndboldklub. Mark kontaktaði hendan mannin og spurdi, um vit báðir kundu koma til Týsklands at royndarvenja.

Tá var akademiið hjá Flensburg ikki serliga væl upplýst, men nú hava teir fingið eina heimasíðu upp at koyra, sum eitur *www.flensburg-akademie.de*. Teir hava eisini eina síðu á facebook, ið eitur *„Flensburg Akademie GmbH“*. Nú er lættari at finna mailadressur og telefonnummur, sum mann kann kontakta.

Vit vilja fegnir takka Mark fyri alla hjálpina, hann hevur givið okkum, bæði av tí at hann hevur fingið okkum í samband við Flensburg og av tí, at hann var okkara venjari í fjør, og hevur ment okkum sera nógv. Túsund takk Mark!

Tað hevur gingist fínt hjá okkum higartil, vit trívast væl og hava fingið nógvar nýggjar vinir.

Reint hondbólts messiga gongur tað eisini fínt. Hørður hevur verið skaddur frá tí vit komu her, so hann hevur sitið á bokinum og hugt, meðan restin av liðnum hevur vant og spælt dystir í tveir mánaðir nú. Men hann byrjar at venja spakuliga aftur og við góðari viðgerð frá lækna og fysioterapeuti gongur tað rætta vegin.

Hjá Brandi hevur gingist væl, hann hevur fingið nógva spælitíð hvønn dyst, og trívist væl á liðnum.

# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN



PETER KROGH

**Aldur:**
25.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Højre back, men bliver brugt overalt eftersom jeg kan kaste lige godt med begge hænder.

**Hvør FTZ-leikari heldur tú er løgnastur?**
Jóhan Hofgaard.

**Dovnastur?**
Jónas Gunnarsson Djurhuus.

**Størsta „drama queen“?**
Tróndur Arge.

**Hevur flottastu reyv?**
Ári Egason Dam.

**Brúkar mest tíð frammanfyri speglinum?**
Helgi Hoydal.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
Da jeg startede inde mod AG København, og dækkede Mikkel Hansen op!

**Hvørjum songum lurtar tú eftir, tá ið tú ert í brúsu?**
Volbeat.

**Nær fekst tú tín fyrsta muss?**
Jeg var 12-13 år.

**Vaskar tú tíni egnu venjingarklæðir?**
Ja sku da, selvom det lugter.

**Skoraði tú fleiri mál í tínum seinasta dystið, enn tú hevur skorað damur í tínum lívið?**
Jeg har scoret flere damer end jeg scorede mål :P

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
jeg bruger ikke #hashtag#

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
H71 er klart den bedste klub, når man tænker sammenhold og støtte, man skal ikke være bange for at blive holdt indenfor, alle bliver inkluderet og det synes jeg er rigtig vigtigt. Nu kan jeg kun svare for mig selv, men det er dejligt og komme udefra og blive taget så godt imod både fra børn og forældre. Alle hjælper hinanden, og så er det dejligt når der altid er en god opbakning på og udenfor banen.

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT





ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

# h71 klæðini 2015/16



h71 INTERSPORT
Thomas Dam Ítróttur
adidas


Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum skatti

Afturrindan av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT

løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoy-varar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og haraftur at allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25_30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 3 | 82 | 63 | 19 | 6 |
| 2 | KÍF | 2 | 49 | 32 | 17 | 4 |
| 3 | VÍF | 3 | 83 | 77 | 6 | 4 |
| 4 | StÍF | 3 | 78 | 76 | 2 | 2 |
| 5 | Neistin | 2 | 48 | 52 | -4 | 2 |
| 6 | Kyndil | 3 | 65 | 84 | -19 | 0 |
| 7 | T. Klaksvík | 2 | 37 | 58 | -21 | 0 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker

**Útileikarar:**

2 Rasmus Rasmussen
3 Mark Lausen Marcher
4 Boas Heinesen
6 Djóni Vest Højgaard
7 Eindri Frýdal
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
16 Johan Hofgaard
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens à Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

## Team Kláksvík

**Málmaður**

16 Rasmus S. Magnusson

**Útileikarar**

5 Hanus Nordberg
8 Dánjal Kjærbo
10 Niels Viggo Niclasen
13 Bogdan Florea
15 Beinir Johannesen
18 Einar Dam
21 Gilli N. Lorenzen
22 Vilhelm Vilhelmsen
23 Andrias Ellingsgaard
24 Sámal á Tjaldrafløtti
27 Kristoffer Rothaus
88 Jens Pauli Mohr
96 Aksel B. Danielsen

*Bonkur:*
**Svein Rógvi L. Nielsen**
**Olgar Danielsen**

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT